

# Todi vitjar hja Eik

Mánakvøldið klokkan 19 vitjar Todi Jónsson ungdómsdeildina hjá Eik á Tinghúsvegi 49 í Havn. Todi fer at greiða frá, hví føroyskir íleggjarar hava keypt meirilutan í fótbóltsfelagnum Fremad Amager. Hann fer eisini at siga frá ymsum avbjóðingum á yrkisleið sínari sum professionellur fótbóltsleikari. Áhoyrarar kunnu eisini seta honum spurningar. Tiltakið við Toda er ókeypis og ætlað ungum millum 18 og 25 ár.

# Norra tapti ósømiligan dyst

Fýrverk og nógvur roykur var atvoldin til, at dysturin millum Norra og Bosnia varð avbrotin ein hálvan tíma. Í handavend eftir langa steðgin legði Bosnia seg á odda 2-0. Fyrst var tað Zvjezan Misimovic, ið sendi frísprark beinleiðis í netið, og løtu seinni økti Zlatan Muslimovic. Sæð við norskum brillum, byrjaði 2. hálvleikur nógv betur enn fyrri. Norra fekk brotsspark, sum John Carew umsetti til mál, og so birtist vónin aftur hjá heimaliðnum í Oslo. Hóast norðmenn megnaðu at spæla seg fram til fleiri málmøguleikar, so megnaðu norðmenn ikki at javna. Við sigrinum fór Bosnia framum Norra við einum stigi. Turkaland er á odda í bólkinum við 12 stigum, eftir at teir í Aten hølvaðu evropameistararnar úr Grikkalandi av 4-1.

# Bíða framvegis eftir góðum úrsliti

**Rógvi Jacobsen er ikki heilt nøgdur við tapið fyri Ukreina leygardagin. – Vit kunnu sjálvandi ikki krevja ov nógv, men man er sjáldan nøgdur við at tapa, so vit bíða framvegis eftir einum góðum úrsliti, sigur klaksvíkingurin í føroyska álopinum**

**LANDSLIÐIÐ**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Svangaskarð:** Rógvi Jacobsen spældi allan dystin á tamb í álopinum móti Ukreina leygardagin. Mótstøðuliðið var gott og vøllurin ógvuliga ringur, so fortreytirnar fyri einum góðum úrsliti hjá honum og restina av liðnum vóru ikki tær bestu.

– Tað var torført at spæla og ógvuliga tungt. Men tað var galdandi fyri báðar partar, so tað skal ikki vera nøkur undanførsla, segði troytti Rógvi Jacobsen, tá hann var komin undan brúsuni, og hevði skift váta og dálkaða leikbúnan út við ein turran venjingarbúna.

– Nei, tað var ikki nakað gott úrslit. Vit kunnu sjálvandi ikki krevja ov nógv, men man er sjáldan nøgdur við at tapa, so vit bíða framvegis eftir einum góðum úrsliti, segði Rógvi Jacobsen.

### Mann heldur enn bólt

Rógvi Jacobsen var tó hampiliga væl nøgdur við spæli hjá føroyingum.

– Vit standa væl á vøllinum, og teir fáa ikki nøkur gjøgnumspæld álop sum so. Men tað eru hesi innleggini, sum koma, har vit hyggja í so nógv eftir bóltinum, heldur enn at fokusera eitt sindur meir upp á mannin, segði Rógvi Jacobsen.

### Stórur munur á tapum

Hóast hann ikki er heilt nøgdur við úrslitið, so sigur klaksvíkingurin í føroyska álopinum seg merkja eina ávísa framgongd á liðnum:

– Vit síggja nógva framgongd á liðnum. Hópurin er eisini breiðari nú, har er kapping um hvørt pláss og so er hetta fyrsta ferðin síðani Jógvan Martin tók við, at vit eru fullmannaðir. Tað er rættiliga gott at síggja!

– Moralurin er góður góður, og tað er stórur munur á at tapa 6-0 og 2-0. Men vit bíða framvegis eftir einum góðum úrsliti, og vónandi kemur tað mikudagin, segði Rógvi Jacobsen.



*- Vit kunnu sjálvandi ikki krevja ov nógv, men man er sjáldan nøgdur við at tapa, so vit bíða framvegis eftir einum góðum úrsliti, segði Rógvi Jacobsen eftir dystin*



*Oleg Blokhin var nøgdur við úrslitið á Toftum leygardagin, men hann fanst hvassliga at franska fótbóltssambandinum og venjaranum, Raymond Domenech, sum hann metti gjørdu alt fyri at leggja fót fyri Ukreina, tá stríðið um vøllin tók seg upp.*

Oleg Blokhin, ukreinski venjarin:

# – Vøllurin kundi kostað okkum sigurin

**Á tíðindafundinum eftir dystin brúkti ukreinski venjarin, Oleg Blokhin, meginpartin av orku síni til at tosa um vøllin og at finnast at avgerðini hjá UEFA, um at dysturin skuldi spælast. Blokhin vildi heldur spælt á graslíkisvøllinum hinumegin B68-húsið, men var annars nøgdur við sítt lið**

**LANDSLIÐIÐ**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Svangaskarð:** Eftir dystin á leygardagin hevði ukreinski venjarin, Oleg Blokhin, tíðindafund fyri ukreinsku miðlunum. Alt gekk fyri seg á ukreinskum, men Ivan Eginsson týddi tað, sum Oleg Blokhin segði, fyri føroysku fjølmiðlunum.

Oleg Blokhin fanst harðliga at Domenech og franska fótbóltssambandinum. Ukreinski venjarin metti, at teir høvdu gjørt alt fyri at leggja fót fyri Ukreina, nú stríðið um vøllin tók seg upp.

Oleg Blokhin fór enntá so langt sum at siga, at vøllurin á Toftum ikki var egnaður til HM-undankappingardystir, men heldur átti at verið nýttur til amatørdystir.

### Óneyðugt at koma áðrenn

Um orsøkina til, at ukreinar komu so seint til Føroya – bara 20 tímar áðrenn – svaraði Oleg Blokhin, at tað var eingin grund til at koma áðrenn.

Teir sóðu ikki nakra orsøk til at venja á vøllinum áðrenn, men vandu heldur áðrenn teir fóru heimanífrá.

### Nøgdur við liðið

Annars var Oleg Blokhin nøgdur við sítt lið og sigurin. Eftir umstøðunum hevði Ukreina spælt hampiliga fótbólt, og til tíðir góðan fótbólt, segði Oleg Blokhin.

Uttan at koma nærri inn á tað, so metti hann somuleiðis, at teir høvdu valt rættan taktikk ímóti føroyingum.

Men Oleg Blokhin legði so aftrat, at vánaligi vøllurin kundi havt kostað teimum sigurin, og at hann heldur hevði ynskt at spælt á graslíkisvøllinum hinumegin B68-húsið.



*Spælararnir fóru í heilum eftir hæli, tá Føroyar og Ukreina spældu leygardagin. Vøllurin var alt annað enn góður at spæla fótbólt á.*